# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800**

Sosialurin

### 60 ára føðingardagur og silvurbrúdleyp

6. oktober verður Andrias í Túni, Toftum, 60 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

13. oktober hava Hanna og Andrias í Túni verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

### 40 ára føðingardagur

Fríggjadagin 22. oktober verður Jákup Berg, Sambýlið á Bárðarfløtti í Vági 40 ár.

Vælkomst verður í Stóra Pakkhúsið í Vági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Jákup við at koma, kunnu ringja í Sambýlið áðrenn 17. okt. á tlf. 374074.

### Brúdleyp

Sunnudagin 10. oktober kl. 15.30 giftast í Biersted kirkju, Búgvi Nattestad, ættaður av Tvøroyri, og Annika Poulsen, ættað úr Vági. Brúdleypsadressan er: Nørrehalne Forsamlingshus, Bakkemøllevej Nørrehalne, 9430 Vadum.

Leygardagin 9. oktober giftast Guðrun Godtfred Leo, Hvalba, og Mortan Ólason Vang, Tórshavn. Vígslan verður kl. 11.00 í Ebenezer. Familja, vinir og kenningar eru vælkomin í brúdleyp í HB-húsinum kl. 13.00.

Dania Paula Danielsen og Bárður Dam í Baianstovu verða vígd í Vesturkirkjuni 6. november kl. 15.00. Veitslan verður í HB-húsinum sama dag kl. 19.00. Øllm ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at boða frá á 322301 ella 322303 í seinasta lagi sunnudagin 10. oktober.

### Brúdleyp og silvurbrúdleyp

Týsdagin 12.oktober kl. 18.00 giftast í Glyvra kirkju Joan Erhardsdóttir Justinussen, Glyvrar, og Dan Lysholm Jensen, Argir.

Sama dag hava Jakoba og Erhard Justinussen, Skipanes, silvurbrúdleyp.

Brúdleypið og silvurbrúdleypið verður hildið í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag á Glyvrum leygardagin tann 16. oktober kl. 17.00 fyri innbodnum.

Eftir kl. 22.00 verður opið hús á sama stað, har øll, ið hava hug at gleðast saman við brúðarparinum og silvurbrúðarparinum eru hjartaliga vælkomin.

# Lívbjargarin segði farvæl

**Leygarmorgunin hevði Jens Ásar Olsen sín seinasta starvsdag í Klaksvíkar svimjihøll. Eftir 30 ár fer hann nú frá sum lívbjargari, og í tí sambandinum høvdu starvsfelagar og kommunan skipað fyri einari lítlari samankomu í høllini**

SAMANKOMA
*Solby A. Eliaesen*
*solby@sosialurin.fo*



*Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen handaði Jens Ásari eina lítla gávu í sambandi við, at hann nú er farin frá sum lívbjargari*

*Mynd: Norðlýsið*

Leygarmorgun svimja vanliga nógv fólk í Klaksvík. Serliga eru nógvar barnafamiljur. Seinasta leygarmorgun var ein serligur dámur í høllini, og kaffiborð stóðu fram við kappingarhylinum. Hetta tí at Jens Ásar Olsen, sum hevur arbeitt í høllini í 30 ár, fór frá. Kaffi, køkur og sunkist og bomm til børnini var at fáa. Og borðið varð dúgliga vitjað allan morgunin. Serliga børnini frøddust um møguleikan at fáa sunkist og bomm, meðan tey svumu. Nógv vaksin gingu eisini í teirra svimjiklæðum og drukku kaffi, meðan tey nýttu høvi at heilsa upp á Jens Ásar. Umframt at mong vóru komin í høllina bert til hetta høvið og ikki at svimja.

Jens Ásar Olsen verður ikki longur at síggja í svimjihøllini sum lívbjargari. Men at svimja fer hann helst kortini.

– Eg vænti enntá, at eg fari at sleppa ókeypis fram við billettsøluni av og á, tók Jens Ásar skemtandi til.

Nógv fólk var og svam í høllini hendan morgunin, og nógv vóru somuleiðis komin at siga Jens Ásari farvæl á hesum seinasta starvsdegi.

Meðan børnini stuttleikaðu sær óført í hyljunum, vórðu fleiri røður hildnar. Millum annað Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, onkur av starvsfeløgunum og umboð fyri fólk, ið svimja dagliga.

Øll komu tey inn á lætta sinnalagið á Jens Ásari, sum uttan iva hevur sett sín dám á gerandisdagin í høllini líka síðani hon lat upp í 1974.

– Tá høllin læt upp, var tað ein stórur dagur fyri klaksvíkingar. Men hetta er ikki beinleiðis nakar stórur dagur, nú Jens Ásar fer frá. Men tað minsta vit kunnu gera, er at senda honum heilsur við á vegnum, helt ein fyri í røðu sínari.



*Starvsfelagarnir hjá Jens Ásari í høllini og kommunan høvdu tikið stig til hugnaløtuna leygarmorgunin*

*Mynd: Norðlýsið*



## Stórsigur til generalin

Nú er greitt, at Yudhoyono, generalur, vann forsetavalið í Indonesia herfyri.

Í gjár var liðugt at telja atkvøðurnar í 31 av teimum 32 landspørtunum, og tá hevði generalurin fingið 24 milliónir fleiri atkvøður enn fráfarandi forsetin, Megawati Sukarnoputri. Í tí landspartinum, sum var eftir at telja, eru bara 300.000 veljarar, so úrslitið har broytir einki. Formliga tekur Yudhoyono við tann 20. oktober.

Generalurin er eisini farin at fyrireika eg til tað nýggja starvið. Hann segði í gjár, at hann ætlar sær at skipa stjórn innan 100 dagar, og tá skulu indonesar eisini fáa at vita, hvørji mál hann og stjórnin fara at seta sær.

Indonesia er tað fólkaríkasta muslimska landið í heiminum. Umleið 123 milliónir fólk vóru á vali.

## Valdsskifti í Slovenia

Teir konservativu og teir høgrasinnaðu vunnu tjóðartingsvalið í Slovenia um vikuskiftið.

Sunnukvøldið noyddist Anton Rop, forsætisráðharri, at ásanna, at samgongustjórnin hevði tapt valið, og at tann liberaldemokratiski flokkurin hjá forsætisráðharranum noyðist at sita í andstøðu tey næstu fýra árini. Samstundis kunngjørdi formaðurin í demokratiska flokkinum, Janez Jansa, at hann ætlar sær at skipa eina mið-høgrastjórn.

Munurin á samgonguni og andstøðuni var ikki stórur, tá uppteljingin var liðug. Úrslitið kom kortini ikki óvart á fólk, tí veljarakanningar undan valinum høvdu víst, at andstøðan stóð til at vinna.

## Fær ikki borgararætt

Anne Frank, sum bleiv svikin og latin nazistunum í Amsterdam í 1944, fær ikki niðurlendskan ríkisborgararætt. Tað bar heilt einfalt ikki til sambært galdandi lóg.

Anne Frank og familja hennara flýddu úr Týsklandi til Niðurlond, tá nazistarnir komu til valdið, og í 1941 tóku myndughleikarnir týska ríkisborgararættin frá henni. Hon gjørdist ongantíð niðurlendskur ríkisborgari og var tí statsleys, tá hon doyði av tyfus í týskari týningarlegu í mars í1945.

Nú hava nógvir kendir niðurlendingar talað fyri, at hon eigur at fáa niðurlendskan ríkisborgararætt, sjálvt um hon doyði fyri 59 árum síðani. Tey vilja vera við, at hon er tann best kendi niðurlendingurin í søguni, og at sjálvt listamaðurin Vincent van Gogh og fótbóltsstjørnan Johan Cruyff kunnu ikki sammetast við hana í so máta.

Men niðurlendsk lóg loyvir ikki myndugleikunum at geva deyðum fólki ríkisborgararætt, og tí verður Anne Frank verandi statsleys. Løgmálaráðið sigur seg skilja tey, sum hava talað hennara søk, men at tað noyðist at halda seg til lógina.

Anne Frank gjørdist heimskend, tá dagbókin, sum hon skrivaði í týningarleguni, kom út í 1947. Bókin er týdd til umleið 60 mál og er seld í nógvum milliónum eintøkum. Tað var pápi Onnu, Otto Frank, sum gav bókina út. Hann slapp livandi úr týsku týningarleguni og fekk niðurlendskan ríkisborgararætt í 1949.

## Tey fremmandu nógv verd

Nógvir danir halda, at lítil nytta er í teimum nógvu fremmandafólkunum, og at tey tvørturímóti kosta samfelagnum nópgvar pengar.

Men nú vísir ein kanning, at í verulekanum kann samfelagið fáa stórt gagn av teimum fremmandu. Kanningarstovnurin Epinion sigur, at eydnast tað at útbúgva 7.000 fremmandafólk til at arbeiða innan almannaverkið, kann tað geva tí almenna sjey milliardir krónur í vinningi.

Epinion vísir á, at stórur tørvur er á arbeiðsmegi innan almannaøkið, og at tey fremmandu kundu loyst hendan tørvin. Tað hevði eisini loyst seg fyri samfelagið, sjálvt um tað kostar ímillum 300.000 og 700.000 krónur at geva einum fremmandafólki ta neyðugu útbúgvingina, sigur stovnurin.

UTTAN ÚR HEIMI

# Einki fátækradømi um 50 ár

**Tað ber til at útrudda fátækradømið í menningarlondunum innan 2050, sigur varastjórin í Heimsbankanum.**

FÁTÆKRADØMI
*Árni Joenen*
*fartekst@mail.dk*

Heimsbankin væntar stóran vøkstur í heimsbúskapinum tey næstu árini. Bankin roknar við, at búskapurin fer at veksa úr 35.000 milliardum dollarum í 135.000 milliardir dollarar tey næstu 45 árini. Tað fer at hava við sær, at heimurin verður førur fyri at metta tvær milliardir fólk afturat, og at øll fáa sín grundleggjandi tørv nøktaðan, sigur bankin.

-Tað ber til at sleppa av við fátækradømið innan 2050, men tað krevur, at vit longu nú seta okkum niður og leggja eina langtíðarætlan, sigur varastjórin í Heimsbankanum, Ian Johnson, við danska blaðið Information.

Hann sigur, at sosialur ójavni er orsøk til nógvar ósemjur. Heimurin fer at fáa stórar trupulleikar, um tey ríkastu 20 prosentini framvegis standa fyri 80 prosentum av bruttutjóðarframleðsluni í 2050. Tí er tað sera mráðandi, at vit gera nakað munagott fyri at beina fyri fátækradøminum í menningarlondunum, sigur Ian Johnson.

Tøl hjá bankanum vísa, at í 1990 høvdu umleið ein triðingur av heimsins íbúgvum minni enn ein amerikanskan dollara at liva fyri um dagin. Málið hjá bankanum og ST er, at hesin parturin skal vera ein sjeyndapartur í 2015, og at fátækradømið er burturi í 2050.

Skal málið røkkast, mugu tær politisku leiðslurnar kunnast betur, heimshandilin má gerast frælsari, bardagin ímóti fátækradøminum má skipast betur, og inntøkurnar mugu býtast javnari enn í dag.

# Leggja Ísrael undir at søkja at sivilfólki

**Minst 14 palestinar, tey flestu sivilfólk, doyðu í einum ísraelskum álopi á Gaza-geiran sunnudagin. Útlendsk hjálparfólk eru í øðini um ísraelsku framferðina.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Hjálparfelagsskapir og ST leggja Ísrael undir at fara alt ov harðliga fram ímóti palestinskum sivilfólki.*

-Ísrael søkir við vilja at sivilum málum og brýtur fólkarættin, sigur Gudrun Bertinussen við NTB. Hon arbeiðir í Miðeystri sum umboð fyri Norsku Fólkahjálpina.

Norska umboðskvinnan sigur, at støðan í Gaza-geiranum er so álvarssom, sum hon ikki hevur verið í fleiri ár. Norski uttanríkisráðharrin, Jan Petersen, fordømdi sunnudagin ísraelsku framferðina í Gaza-geiranum og serliga áopið á flóttafólkaleguna Jabalyia. Eisini ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, hevur hvassliga fordømt framferðina hjá ísraelska herinum.

Men ísraelsku myndugleikarnir lata ikki atfinningarnar við seg koma. Sunnudagin fóru umleið 200 stríðsvognar og gravkýr inn í Gaza-geiran. Frammanundan høvdu ísraelsmenn søkt at fleiri flóttafólkalegum, og sambært keldum á sjúkrahúsunum hava álopini teir seinastu dagarnar kostað minst 60 palestinum lívið. Tríggir ísraelsmenn eru deyðir í samanbrestunum.

### Hjálp frá ST

Um vikuskiftið kravdu ísraelsku myndugleikarnir, at leiðarin fyri ST-matvøruhjálpini í teimum palestinsku økjunum, danin Peter Hansen, skuldi koyrast frá. Ísrael vil vera við, at ST hevði latið víðgongdar palestinar flyta eina rakett í einum sjúkrabili. Tað sást á myndum, sum eitt ómannað flogfar hevði tikið, søgdu ísraelsku myndugleikarnir.

Peter Hansen hevur víst skuldsetingini aftur. Hann sigur, at tað var ikki ein rakett, men ein børa, sum bleiv borin inn í sjúkrabilin, og ST hevur kravt, at Ísrael skal taka skuldsetingina aftur.

Altjóða fjølmiðlar siga, at ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevur lovað at halda á við álopunum á Gaza-geiran, so leingi vandi er fyri, at víðgongdir palestinar skjóta rakettir inn í Ísrael. Seinasta mikudag rakti ein rakett býin Sderot, og tvey børn lótu lív.